## 30% óvirkað av landinum

**Fiskivinna:** Eins og fyribils metingin hjá Hagstovuni vísti í januar, so er nakað væl minni av feska fiskinum farin óvirkaður av landinum, bæði tá talan er um nøgd og sum prosentpartur.

Í 2004 fóru 30% av toskinum, hýsuni og upsanum óvirkað av landinum, afturímóti 33% árið frammanundan.

Tað er framvegis mest hýsa, sum fer óvirkað av landinum. Tað fóru soleiðis 12.000 tons ella 54% av fiskaðu nøgdunum óvirkað av landinum. Av toski fóru 6.000 tons, sum er 24%. Og av upsa fóru sløk 9.000 tons, sum er 21% av avreidda upsanum samanlagt.

Av hesum trimum sløgum fóru altso samanlagt 27.000 tons ella 30% óvirkað av landinum.

**sb.**

## Øðrvísi sunnukvølds møti

**Argir:** Sunnukvøldið 6. mars var ikki vanligt møti á skránni í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum.

Ístaðin varð filmurin "Behind the Sun" vístur. Eini 40 fólk vóru komin saman fyri at síggja filmin.

Filmurin var um ein muslim, sum var blivin umvendur, eftir at hann hevði verið í USA og fingið sær hægri lestur. Hann fór síðani heim til familjuna, og tá tey fingu hetta at vita, var tað illa dámt.

Í filminum sær ein, hvussu hann verður viðfarin av sínum egnu, og hvussu hann kemur í eina undirgrunds-kirkju í býnum.

Hetta er fyrstu ferð at filmur er sýndur á einum sunnukvøldsmøti, men sum skilst verður tað ikki seinastu ferð.

Eftir at filmurin var liðugur, var náttverði á skránni.

**sb.**

## Ikki rætt

**Klaksvík:** Ikki óvæntað eru flestu lesarar av Norðlýsinum ikki samdir við ætlanini, at flyta Toll og Skattstovuna til Gøtu.

Ein kanning á heimasíðuni vísir, at 65 % hava svarað noy og bert 35 % ja til hesa ætlanina. 1193 greiddu atkvøðu.

**sb.**

# Betra umstøðurnar til flutningin sjóvegis



*Silja stevnir út av Vestmanna. Nú skulu umstøðurnar til ferðafólkini somuleiðis betrast á landi*

*(savnsmynd)*

**Vestmanna:** Bygdarráðið í Vestmanna skal á fundi í kvøld taka støðu til tvey uppskot sum hava við tað virksemið innan ferðavinnuna, sum bygdin er vorðin heimskend fyri.

Á fundinum er nevniliga eitt uppskot frá p/f Sea Service um at loyvi at leggja bátarnar hjá felagnum uttanfyri havnaskrivstovuna og at hava ferðavinnuvirksemi á hesum staðnum. Hetta er felagið sum eigur bátarnar Silju og Fríðgerð, og sum í næstum fær enn ein bát til flutning av ferðafólkum.

Eitt annað uppskot skal eisini til viðgerðar, og tað er frá sp/f Skúvadal, sum søkir um loyvi at leggja eina bátabrúgv uttanfyri bátahylin til ferðavinnuendamál. Hetta er uttanfyri økið, har Vestmanna Touristcentre í løtuni letur eina ferðavinnubygning byggja.

Havnanevndin hjá Vestmanna kommunu hevur gjørt síni tilmæli til hesar báðar umsóknirnar, og tað eru tær, sum bygdarráðslimirnir skulu taka støðu til á fundinum í kvøld.

**sb.**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 12, 2005
www.kaupthing.fo

# Útlit til ein veikan dollara

MARKNAÐARRÁK

Sum væntað var dollarakursurin í andgletti í farnu viku. Amerikanski gjaldsjavnin fyri 4. ársfjórðing 2004 vísti eitt hall á 188 milliardir dollarar, og tað var meir enn væntað. Tað fekk dollaran at vikna upp um 1,34 fyri hvørja evru. Sum nevnt í síðsta Marknaðarráki er tó lagt upp til enn størri hall hendan ársfjórðingin, orsakað av hækkandi oljuprísinum.

OPEC hevði fund í farnu viku, har staðfest varð, at tey fara at økja framleiðsluna við 2%. Tað fekk tó ikki oljuprísin at lække, marknaðirnir meta ikki, hetta er nokk til at nøkta tørvin. Ein orsøk til, at prísurin er um 55 dollarar fyri tunnuna er eisini, at OPEC uppmetti prísbandið til 40-50 dollarar, og harvið signaleraði, at oljuprísurin ikki lækkar av álvara við bræði.

### Lánsbrævarentur sveiggja enn

Danska 10-ára rentan hevur seinasta mánaðin sveiggjað aftur og fram millum 3,70% og 3,90%. Tað, sum setir dagsskránna fyri, hvønn veg vit av álvara skulu bróta út úr hesum strekki, eru amerikonsku lánsbrævarenturnar, oljuprísurin og dollarakursurin. Oljprísurin og amerikonsku renturnar hála upp, veiki dollarin niður.

### Norrøn partabrøv óstøðug

Norrøn partabrøv vóru óstøðug í farnu viku, endaðu tó eitt sindur lægri enn tey byrjaðu vikuna. Høgi oljuprísurin, stálprísurin og flutningskostnaðurin stuðlar undir m.a. A. P. Møller-Mærsk, Frontline og Statoil. Tó eru kursirnir hækkaðir nógv í ár soleiðis, at íleggjarar javnan nýta høga stigið til at staðfesta vinning.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna setir USA dagsskránna. Tjóðbankin, Fed, hevur rentufund týskvøldið. Lítil ivi er um, at tey fara at hækka rentuna 0,25% aftrat, so hon kemur upp á 2,75%. Tað áhugaverda verður tíðindaskrivið, sum kemur út eftir fundin. Íleggjarar fara at leita eftir teknum um, at Fed tekur prísvøksturin í so stórum álvara, at tey kunnu hækka rentuna meir enn 0,25% næstu ferð. Júst amerikonsk prísvakstrartøl koma í vikuni, og tey fara sera sannlíkt at seta størsta dám á marknaðirnar hesa vikuna.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,59 | 1,0% | ↑ |
| JPY | 5,34 | 0,3% | ↑ |
| GBP | 10,74 | 0,8% | ↑ |
| NOK | 0,91 | 0,4% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,01 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 171,67 | 0,3% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 90,52 | -0,8% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 59,97 | -1,2% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*